## NØVN Í VIKUNI



### Terji aftur í Frændum

Fyri fyrstu ferð í næstan 10 fer Terji Rasmussen at spæla við í Frændum.

Høvið er ólavsøkukonsertini, sum verður hildin í Kommunuskúlagarðinum fríggjakvøldið.

Terji Rasmussen, sum í áttatiárunum var ein av sangarunum í Frændum, verður við aftur í bólkinum til hetta serliga høvi, umframt at hann eisini verður ein av sangarunum í MC Hár á ólavsøkukonsertini.

Terji var við í tveimum av útgávunum hjá Frændum. Tann næsta í røðini hjá bólkinum, Frændur 2 frá 1986, var tann fyrra við Terja, og tað er á hesi útgávuni, at hann syngur tiltikna kærleikssangin, Eros, sum hann og Steintór Rasmussen skrivaðu í felag.

Um hetta mundið vóru nógvir ymiskir sangarar í Frændum, men fram til triðju útgávuna, nógv virdu 80'ini frá 1988, fóru fleiri sangarar úr bólkinum. Høvuðsmenninir Eyðun Nolsøe, Rani Nolsøe og Steintór Rasmussen tóku alt meira yvir, men Terji hevði framvegis ein leikut í bólkinum.

Á útgávuni 80'ini syngur Terji millum annað í heitissangunum, 80'ini.

Terji fór úr Frændum á vári í 1989, tá hann fór í holt við sína egnu útgávu. Hendan útgávan kom undir navninum Terji og Føstufressar.

Síðani hevur Terji onkuntíð verið á palli saman við Frændum, men seinastu ferð var í 1993. Síðani hevur Terji spælt í øðrum bólkum, og seinastu árini hevur hann serliga samstarvað við Eyðun Nolsøe, sum er ein av frædnunum.

– Tað er stuttligt at fara á pall saman við Frændum aftur. Tað líkist nógv tí at spæla saman við Eyðuni, tí vit hava fleiri Frændur sangir á skránni, men sjálvandi verður hetta nakað øðrvísi, sigur Terji Rasmussen.

Mánadagin vandi Frændur í Havnini, og fríggjakvøldið verður tað teirra uppgáva at enda ólavsøkukonsertina.

Teir fara at spæla nakrar av sínum kendastu sangum, og Terji Rasmussen fær sum skilst ein týðandi leiklut í framførsluni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma, langomma og systir okkara

**Aslaug Borðá**

bleiv sjúk, doyði og varð jarðað.
Tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi og á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til prestarnar Berg D. Joensen og Ólav Rasmussen fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til urguspælarar, sangarar, gravarar, bilførarar og øll tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Tøkk fyri blómur, peningagávur, vitjanir, uppringingar og tøkk til øll tykkum, ið hjálptu til.

*Vegna tey avvarðandi*

**Sólrún, Elvin og Enok**

# Næraberg landar í Klaksvík



*Næraberg landar í Klaksvík hesa vikuna*

Stóri svartkjaftatrolarin, Næraberg, liggur í løtuni í Klaksvík, har hann verður landaður á Northern Fish Cold Storage.

Næraberg hevur seinastu seks vikurnar roynt í íslendskum og føroyskum sjógvi. Næraberg leggur 750 tons av surimi og 280 tons av mjøli upp úr Klaksvík.

Ætlanin er,at Næraberg skal fara avstað aftur hóskvøldið.

**ek**

# Vildu bumba norskt verjuskip

FISKIVINNA
*Jógvan Hugo Gardar*

**Noreg:** Ósemjan millum norðmenn og russar um Svalbard-øki herðist. Russar eru í øðini inn á norðmenn tí teir vilja kanna russisk skip sum fiska við Svalbard.

Sambært russiska blaðnum Rybnaja Stolitsa skal norski fiskimálaráðharrin Otto Gregussen hava fingið greið boð frá russiska starvsfelagnum Jevgeniij Nazdratsjenko, tá teir hittust í Bodø nakað herfyri.

- Vit koma at geva okkara skipum boð um at bumba norsk verjuskip sum royna at steðga russiskum trolarum sum fiska á Svalbardleiðini, segði Nazdratsjenko, og lovaði samstundis at norskir sjómenn sum møguliga yvirlivdu bumbingina ikki skuldu bjargast.

Russar lova norðmonnum harðar samráðingar um fiskiskapin í Barentshavinum, tá partarnir hittast til árligu samráðingarnar í november.

Norskir myndugleikar hava ikki vilja úttala seg um russisku hóttanina.



*Otto Gregussen*

# Teir yngstu leggja fyri

### Faroe Teens verða fyrsti bólkurin, sum fer á pallin á ólavsøkukonsertini

Yngsti bólkurin á ólavsøkukonsertini í ár er Faroe Teens. Hetta er ein bólkur, sum er mannaður við ungum dreingjum kring landið.

Sangari í bólkinum er Brandur Enni, sum eisini er kendur frá útgávunum hjá Kulum Rótum.

Tað verður uppgávan hjá Faroe Teens at leggja fyri á ólasvøkukonsertini í ár, og tað gleða teir seg til.

– Hetta er ein spennandi uppgáva, sum vit hava fingið, og vit stúra ikki fyri at verða fyrsti bólkurin á pallinum, sigur Brandur Enni, sangari í bólkinum.

Faroe Teens vunnu sær rættin til at spæla á ólavsøkukonsertini í Pop Top konsertini. Har verður ein vinnari funnin, sum sleppur at spæla á ársins størstu konsert, og í ár var tað Faroe Teens.

Ungi bólkurin, sum byrjaði at spæla fyrr í ár er tí komin í gott selskap, men tað nervar teir ikki, at teir skulu á pallin saman við bólkum sum Frændur, All that Rain og Týr.

– Vit fara at fyrireika okkum væl til konsertina, so tað verður eingin trupulleiki at spæla fyrst, sigur sangarin í bólkinum.

Ólavsøkukonsertin verður fríggjakvøldið.

**ek**



*Brandur Enni og hinir í Faroe Teens verða fyrsti bólkurin á pallinum á ólavsøkukonsertini*



# Lóg um arvagransking í Føroyum er á gáttini



*Pál Weihe hevur fyrireikað arbeiðið upp á at gera lóg um arvagransking í Føroyum*

**Arbeiðið við einari lóg um arvagransking í Føroyum hevur verið ávegis eina tíð nú, og ætlanin var, at uppskotið skuldi leggjast fyri løgtingið á ólavsøka. Nú verður lógaruppskotið klárt í fyrsta lagi um tríggjar vikur**

ARVAGRANSKING
*Heri á Rógvi*

Í gjár skrivaði Sosialurin um, at fleiri kanningar skuldu gerast at nýføðingum í Føroyum. Hetta arbeiðið verður mett at byrja um 1. august. Her er tó bert talan um blóðroyndir, sum verða kannaður fyri sjúkur. Oftani hevur verið at hoyrt um arvagransking í Føroyum, men higartil hevur ikki verið nøkur lóggáva, sum ásetur, hvussu farast skal fram innan arvagransking í Føroyum. Ein tílík lóggáva er tó á veg, og skuldi hetta arbeiðið eftir røttum verið lagt fram fyri tingið um ólavsøkuna. Tað hevur verið Pál Weihe, sum vegna deilidina fyri arbeiðsmedisin hevur staðið fyri arbeiðinum at fyrireika eina lóggávu. Løgfrøðiligi parturin hevur verið greiddur við kønari hjálp útifrá.

### Leingi ávegis

Tað var Helena Dam á Neystabø, fyrrverandi landsstýrismaður, sum setti arbeiðið í gongd við at gera lóg um arvagransking í Føroyum. Helena Dam Neystabø sigur, at sjálvt arbeiðið uppá lóggávuna var sett í gongd fyrst í hesum árinum, men tað verið frammi í eina tíð.

-Tað var eftir politiskum ynski, at arbeiðið varð sett ígongd, men var samstundis eisini eitt ynski hjá mær, tí eg helt, at tað var tørvur á hesum, sigur Helena Dam á Neystabø.

Sambært Jenis av Rana, løgtingsmanni, so vóru politikarnir veruliga sína uppgávu verdir, tá orðaskifti var í tinginum um arvagransking í sínari tíð. Hetta var í sambandi við, at eitt íslendskt felag ætlaði sær at fara undir arvagransking í Føroyum, at orðaskifti byrjaði um hesar spurningar. Tá mettu løgtingsmenn, at føroyska samfelagið ikki var búgvið til føroyska samfelagið.

### Fer til hoyringar

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, hevur so at siga arvað málið um arvagransking. Hann tók við eftir Helenu Dam á Neystabø. Hann sigur, at uppskotið fer til hoyringar ymsastaðni, tá hann fær tað, og hesi fáa 14 dagar at gera viðmerkingar. Tað verður eitt nú landslæknin og Vísindasiðseminevnd Føroya, sum fáa møguleikan til at gera viðmerkingar. Hetta er eitt nógv umtalað evni, so tað kann lættliga hugsast, at viðmerkingar koma til uppskotið.

-Eftir at uppskotið hevur verið til hoyringar, verður alt lisið ígjøgnum og møguligar broytingar vera skrivaðar í uppskotið, og síðani fer tað í tingið til viðgerðar og støðutakan,sigur Sámal Petur í Grund.

Tað verður tískil í fyrsta lagi um tríggjar vikur, at uppskotið verður lagt fyri tingið. Tað er væntandi ikki langt av leiði at ímynda sær, at tað dregur longri út.

### Ov nógvur kapitalur

Eitt tílíkt mál sum arvagransking hevur ikki verið so nógv frammi í politiska heiminum í Føroyum. Ein flokkur, sum hevur markerað seg rættiliga nógv innanfyri sovorðin øki sum hetta, er Miðflokkurin.

Flokkurin orðaði fyri nøkrum árum síðani ein politik á økinum.

- Politkkurin hjá okkum gongur fyrst og fremst út uppá at tryggja rættindini hjá tí einstaka. Einstaklingurin má ikki ofrast fyri kapitalinum, sigur Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri Miðflokkin.

- Tað hevur eisini stóran týdning, at føroyingar hava ræðið á støðuni í staðin fyri útlendingar. Tað skal vera frívilligt hjá tí einstaka, og vit mugu siga, at trygdin fyrst og fremst skal vera tað týdningarmikla, sigur Jenis av Rana.

Jenis sigur eisini, at tá málið var frammi fyri nøkrum árum síðani, so vóru fleiri viðurskifti, sum ikki vóru í lagi. Tað var ov nógvur kapitalur, sum vann á teimum menniskjaligu áhugamálunum, sigur Jenis av Rana.

Politikkurin hjá Miðflokkinum er rættiliga líkur tí arbeiðssetningi, sum Vísindasiðseminevnd Føroya hevur at arbeiða eftir. Jenis av Rana sigur eisini, at nevndin arbeiðir eftir hesum sama leisti.

Hetta málið er eitt av hjartamálunum hjá Miðflokkinum, og hetta verður bara byrjanin til fleiri orðaskifti um arvagransking, tí hetta er eitt so stórt mál, sigur Jenis av Rana.

